# Tey heimleysu koma nú í tingið

**Tey heimleysu í Føroyum skulu nú hava eitt virðiligari lív og ábyrgdin skal býtast ímillum landið og kommunurnar**

HEIMLEYS
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nú fer hans Pauli Strøm, landstýrismaður, at taka ítøkilig stig fyri at geva teimum heimleysu í Føroyum eitt virðiligari lív*

Nú skulu tey heimleysu í Føroyum hava betri umstøður.

Tað er eitt mál, sum Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum hevur sett sær fyri í tí nýggja árinum.

Í vár fer hann sostatt at leggja uppskot fyri løgtingið um viðurskiftini hjá teimum heimleysu.

Uppskotið, sum hann fer at leggja fyri løgtingið er grundað á tilmælið, sum hann fekk frá einum arbeiðsbólki í summar um viðurskiftini hjá teimum heimleysu.

Hans Pauli Strøm sigur, at samtykkir løgtingið uppskotið, fer hann síðani at biðja um pening á fíggjarlógini at seta tey tiltøk í verk, sum standa í uppskotinum.

Tað kann so gerast á fíggjarlógini fyri 2007. Men vil Løgtingið hava tiltøkini sett í verk skjótari, kann tað eisini vera á eini eykajáttanarlóg einarferð næsta ár.

Støðan hjá teimum heimleysu hevur verið ræattiliga nógv umrødd í fleiri ár og teirra kor í dagsins Føroyum hava onkuntíð verið skýrd ein landsskomm.

Ein stórur ivaspurningur er, um tað er landið ella kommunurnar, sum hava ábyrgdina av viðurskiftunum hjá teimum heimleysu.

Mett verður, at tað eru eini gott 20 heimleys í Føroyum – og tey eru øll í Havn.

Av teimum verður mett, at eini 12 hava brúk á einum heimi.

Tað, sum lagt verður upp til í uppskotinum, sum verður lagt fyri Løgtingið, er, at tað skal verða kommunan, sum hevur ábyrgdina av teimum heimleysu og hava ábyrgdina av at seta tey neyðugu tiltøkini í verk.

Men tey tiltøk, sum verða sett í verk, skulu setast í verk í samráð við teir sjálvbodnu felagsskapir, sum virka á økinum, eitt nú Frelsunnarherin og Bláa Kross.

Talan kann vera um, at kommunan leigar seg inn hjá teimum sjálvbodnu felagsskapinum.

Hinvegin skal landið betala 2/3 av tí, tað kostar at reka tey tiltøk, sum verða sett í verk

Tað, sum uppskotið hjá Hans Paula Strøm miðjar ímóti, er at stovna eitt heim til heimleys í Havn.

– Tað skal vera eitt heim, har tey kunnu koma treytaleyst. Talan er um ein umsorganarbústað og tað merkir, at heimið tekur ímóti teimum útfrá teirra egnu fortreytum. Sostatt eru ongi krøv um, at tey skulu vera edrú, ella skulu til avvenjingar.

– Tað skulu ikki setast krøv til hesi fólkini, sum tey ikki kunnu liva upp til kortini.

Á heiminum skulu tey hava umstøður, sum tey kunnu kalla eitt heim, tað vil siga, eina fjálga song og umstøður at goyma og varðveita tað, tey eiga.

Samstundis skal fólk verða á staðnum, sum kann veita teimum tað røkt, ið tey sum menniskju hava tørv á fyri at tey kunnu liva eitt virðiligt lív.

– Trupulleikin hjá teimum heimleysu er, at tey megna ikki at halda fast um ein bústað, tí tey eru mangan ikki før fyri at gjalda, ella verða koyrd á dyr av øðrum orsøkum. Tí haldi eg, at vit eiga at skipa teimum eitt stað, sum tey kunnu kalla eitt heim, sigur Hans Pauli Strøm

Hann sigur kortini, at samstundis er eisini ætlanin at bøta um herbergini, har fólk detta inn av gøtuni.

# Vágbingar inn í 2006 við vanliga veitslurómanum

**Vágur er nýggjársbygd og eisini árskiftið 2005/2006 varð hildið við øllum tí, ið hoyrir til, tá ein hevur gingið á odda í meira enn 35 ár**

NÝGGJÁR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Vágbingar taldust millum teir fyrstu, ið av álvara fóru at gera nógv burturúr nýggjárshaldi. Mitt í sekstiárunum tóku ungfólk seg saman og síðani vant hetta uppá seg. Vágbingar høvdu stóra veitslu við tiltiknum skemtarum, og ikki minst bál og fýrverk vóru í serflokki.

Onnur støð í Føroyum skipaðu síðani fyri nýggjárshaldi eftir sama leisti og í dag er tað vanligt, at í hvussu er størru plássini gera nógv burturúr.

**Við tað gamla**

Ársskiftið 2005/2006 varð eisini hildið í Vági, sum tað sømir seg eini nýggjárs- og undangongubygd.

Veitslan var hildin í Stóra Pakkhúsi. Hon hevur áður verið í VB húsinum. Tiltiknu skemtararnir Robert, Niels Petur, Petur og Arnfinn skemtaðu, sum teir hava gjørt tað í eitt mannaminni.

Guðstænasta, kyndlagonga, bál og fýrverk, so ein kemur at hugsa um Tivoli. Dansur í VB høllini til ljósan morgun.

Alt var við tað gamla, men eitt nýtt ár varð skotið inn við manér í fremstu nýggjársbygdini í Føroyum.

# Gomul familjufyritøka á Tvøroyri fer nú í søguna

**Dimon-ættin á Tvøroyri gevst nú at baka og kenda bakaríið í Suðuroy fær nú nýggjan eigara**

Nú á nýggjarinum skifti ein kend familjufyritøka á Tvøroyri, eigara.

Tað er bakaríið og handilin hjá Dimon og á Tvøroyri, sum nú er selt og fer á aðrar hendur.

Tað eru annars 80 ár síðani, at Sofus Dimon fór at baka á Tvøroyri og Oddur Dimon, sum nú eigur bakaríið, er triðja ættarliðið, sum eigur og rekur bakaríið.

Umframt bakarí, var tað eisini kondittarí eitt langt áramál, har nógv fólk stukku inn á gólvið at fáa sær ein drekkamunn við nýbakaðum afturvið.

Í seinni helvt í sekstiárunum, tók sonurin, Áki Dimon yvir og hesi seinastu árini hevur sonur hansara aftur, Odddur, staðið fyri rakstrinum.

Oddur Dimon, sum nú hevur gjørt av at selja, sigur, at hann er blivin troyttur av hesum lívinum. Hann er 44 ára gamal, men hevur arbeitt í bakaríðnum í 28 ár. Fyri trimum árum síðani keypti og yvirtók hann bakaríið eftir pápan, Áka Dimon. Men tað er kanska ikki so undarligt, at bakarar verða troyttur, tí Oddur sigur, at tað er mestsum sjey dagar um vikuna alla tíðina.

Samstundis má hann ásanna, at ongin av hansara børnum eru áhugað at taka yvir og tí avgjørdi hann at selja nú, ímeðan hann hevur aldurin til at royna okkurt annað.

Men hvat tað verður, er ikki endaliga avgjørt enn.

Tann, sum nú hevur keypt og yvirtekur bakaríið, er Hans Olaf Johannesen í Froðba, sum annars eigur og rekur bakaríið Breyðkassin í Porkeri.

Hans Olaf Johannesen ætlar sær nú at halda fram við báðum bakaríðunum.



*Nógv fólk eiga mong spor inni í bakaríðnum hjá Dimon á Tvøroyri, men nú fer tað í søguna. Nýggur eigari yvirtekur tað nú á nýggjárinum*